# Khader hjá borgarstjóra og løgmanni



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, greiddi Naser Khader og konuni, Bente Dalsbæk, frá stóra vøkstrinum í Havnini seinnu árini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Í morgun vitjaði Naser Khader, sum í kvøld klokkan 19 heldur fyrilestur í Miðlahúsinum, borgarstjóran í Havn og løgmann úti í Tinganesi**

VITJAN
*Kári Mikkelsen*
karim@sosialurin.fo

Veðrið hesar dagarnar, Naser Khader hevur verið í Føroyum, hevur avgjørt víst seg frá tí bestu síðuni. Í gjár var Khader-familjan á útferð í Kirkjubø og í Nólsoy, meðan skráin í dag fevndi um eina vitjan hjá borgarstjóranum í Havn, Heðin Mortensen, og Jóannes Eidesgaard, løgmanni.

Borgarstjórin greiddi frá tí stóru menning og vøkstri, sum høvuðsstaðurin hevur verið fyri og framvegis er mitt í. Um stórar skúlaætlanir, infrakervið og útbygg-ingingarnar á sosiala økinum, og hvussu býráðið er samansett politiskt.

Líka sum í býráðshúsinum á Vaglinum var vitjanin í Tinganesi eisini ein kurteisisvitjan, har løgmaður nýtti høvi til undirstrika yvirfyri Naser Khader týdningin av, at danir og føroyingar læra at virða og skilja hvønn annan.

- Eg fortaldi honum, at í einum lítlum landi sum Føroyar gongur ikki alt líka skjótt, men at tað er týdningarmikið, at tingini fáa tíð at mennast og búnast, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður vísti á, at hann sjálvur hevur sitið á Fólkatingi og tí heldur seg hava gott forstáilsi fyri, hvat rørir seg í bæði donskum og føroyskum politikki og viðurskiftunum annars landanna millum.

Sjálvur sigur Khader, at hann fekk nógv burtur úr vitjanini í Tinganesi og í heila tikið hevur fingið eina breiðari vitan um Føroyar.

- Eg fekk at vita frá løgmanni, at tað tekur tíð at broyta tingini her í Føroyum. Hinvegin vísti eg á, at mann ikki má lata standa til ov leingi. Mín varhugi er, at tað eru ov nógvir føroyskir politikarar, sum lúra og bíða við at taka støðu í til dømis abortspurninginum, tí teir eru bangnir fyri egnum politisku fylgjum, sigur danski fólkatingspolitikarin.

Í kvøld klokkan 19 heldur Naser Khader fyrilestur í Miðlahúsinum í Vágbotni undir heitinum, »Trúgv og fólkaræði«.

Í morgin klokkan 15 heldur kona hansara, Bente Dalsbæk, fyrilesturin: »Millum tvær kvinnumentanir.«

Naser Khader, konan og teirra trý børn fara aftur til Danmarkar fríggjadagin.



*Fyrrapartin var Naser Khader í Tinganesi á sokallaðari kurteisisvitjan hjá Jóannesi Eidesgaard, løgmanni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*


LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

## Grundskeið í psykiatri

Skipað verður fyri einum grundskeiði í psykiatri, hvørs endamál er at geva luttakarunum eina størri vitan um psykiatriskar trupulleikar, so hesi verða betur før fyri at fáa eyga á sálarsjúkueyðkenni og at skilja sjúklingin.

**Høvuðsevnini vera:**

- psykiatrisk hugsan og viðgerð í søguligum ljósi
- lívfrøðiligir, sálarfrøðiligir og sosialpsykiatriskir viðgerðarhættir
- diagnosteringsskipanir við høvuðsdenti á ICD-10
- psykotisk eyðkenni
- skizofreni
- persónsmenskutrupulleikar
- affektivir trupulleikar
- nervaveikindi, OCD, angist
- psykiatrisk rehabilitering
- dupultdiagnosur
- børn og ung við psykiatriskum trupulleikum

Skeiðið vendir sær til røktarar, heilsurøktarar, námsfrøðingar, sjúkrarøktarfrøðingar, ergoterapeutar, fysioterapeutar, sosialráðgevar og onnur, ið arbeiða við fólki, sum hava psykiatriskar trupulleikar.

Skeiðið verður í frá 21.-25. mai 2007, allar dagar kl. 8-16 og verður hildið á Landssjúkrahúsinum. Kostnaðurin er 3700,- kr.

Tað er Psykiatriski Depilin, ið skipar fyri.

Nærri upplýsingar um skeiðið og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til Psykiatriska Depilin á Landssjúkrahúsinum, Ænu Reinert ana.reinert@lsh.fo, tlf. 31 45 00 lok 4170 ella til Lív Sondum lslivso@lsh.fo

Tilmeldingarfreistin er 4. mai 2007 og er bindandi

**PSYKIATRISKI DEPILIN**
Landssjúkrahúsið
Tórshavn